## 20 minuttir til Lamhauge

Oddaliðið í næstbestu donsku fótbóltsdeildini, Viborg, vitjaði um vikuskiftið í Silkeborg, har føroyski landsliðsspælarin, Christian Lamhauge Holst, telist millum spælararnar. Úrslitið var ein málleysur javnleikur, sum ber við sær, at Viborg er oddalið við 33 stigum, og at Silkeborg er á triðja plássi við 29 stigum. Silkeborg-venjarin, Troels Bech, hevði ikki givið Christian Lamhauge Holst pláss í byrjunaruppstillingini, men tá 18 minuttir vóru eftir, var Christian settur inn á miðvøllin.



## Brotsspark órógvaði svøvnin

Liðformaðurin hjá AaB, Thomas Augustinussen, var annar av spælarunum, sum brendi brotsspark í UEFA Cup-dystinum ímóti Manchester City hóskvøldið. Spennandi dysturin endaði við brotssparkskapping, sum Manchester City vann. Og alla ta næstu náttina hugsaði Augustinussen um brotsspørk. – Eg svav ikki serliga nógv. Eg sparkaði brotsspørk alla náttina, sigur Thomas Augustinussen við Nordjyske.

VB-Neistin 26-26 (12-13)

# Bæði gliðu í svinginum

**VB gjørdi eitt rimmar come-back, men tað varð til onga nyttu. Tjaldur greiddi sín setning móti Stjørnuni, og so var júst javnleikurin úrslitið, sum sendi bæði VB og Neistan úr finalustríðnum**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Fyrst sá Neistin út til at vinna, men tá VB ímóti endanum megnaði at javna, gjørdist úrslitið, at bæði stóðu eftir við einum óbrúkiligum javnleiki*
*Savnsmynd: Álvur Haraldsen*

Neistin hevði tað mesta í pottinum. Seinastu dystirnar hevur talan mest sum hvørja ferð verið um finalu hjá bláa havnarfelagnum, og alt bendi á, at seinasti dysturin undan sjálvum FM-finalunum veruliga gjørdist ein finala móti Tjaldri.

Eftir ein javnan fyrra hálvleik, har einki sum helst varð avgjørt, settu gestirnir seg á tað mesta eftir steðgin. Hóast Daiva Toumaite og Aukse Vysniauskaite framvegis fingu síni mál, so var restin av liðnum hjá VB fullkomuliga parkerað á síðulinjuni, og upp á 20 minuttir hevði Neistin vunnið seg upp á 26-20, og so skuldi ikki verið so nógv meira at tosað um enn tað sama.

Men so blokeraði mentala hondbremsan hjá Neistanum. Tær spældu seg framvegis til møguleikar, men í skotroyndunum var so eiðasørt, og tað gav VB júst tann møguleikan, sum liðið hevði tørv á.

Og júst VB er eitt lið, sum sjáldan skal hava meira enn ytsta partin av lítlafingri, áðrenn allur armurin verður tikin.

Stríðsviljin á liðnum hevur altíð verið framúr, og seinastu løtuna ótu tær burtur av leiðsluni hjá Neistanum. Og tá Rannvá Johannessen eisini traðkaði framat í málskjótingini, fekk VB breiddina, sum gataði Neista-liðið seinasta pettið. Bara tíggju sekund undan dystarloki skoraði Rannvá til 26-26, og so hjálpti tað lítið, at Neista-kvinnurnar kendu seg snýttar fyri einum brotskasti í seinastu álopsroyndini, tá Nicoleta Radu Hansen leyp inn av veinginum.

Javnleikurin gjørdist endaliga úrslitið, og so var fagnaðurin í høllini ovurstórur, tí við tveimum stigum upp til Tjaldur var møguleikin enn at røkka finaluplássinum – hildu tey flestu.

Reglurnar hjá HSF staðfesta tó, at innanhýsis uppgerðirnar viga meira enn málmunurin, um tað stendur á jøvnum á stigatalvuni. VB hevur tapt tríggjar av fýra uppgerðum móti Tjaldri, og tí er nú eingin sum helst ivi um, at Tjaldur verður liðið, sum í FM-finaluni skal takast við Stjørnuna.

### FAKTA um dystin

**VB-Neistin 26-26 (12-13)**
**10 min:** 4-5
**20 min:** 9-8
**30 min:** 12-13
**40 min:** 15-18
**50 min:** 20-26
**Málskjúttar**
**VB:** Aukse Vysniauskaite 9 (2), Daiva Toumaite 6 (2), Rannvá Johannessen 3, Gurið Mortensen 3 (2), Svava Vestergaard 3, Bára Mortensen 2
**Neistin:** Nicoleta Radu Hansen 8 (2), Annika Ljósstein 4, Trine Mayland 4 (2), Stine Mikkelsen 4, Unnur Danielsen 2, Elin Stakksund 2, Heidi Maria Akselsen 1, Tordis Tróndarsson 1
**Brotskøst:** VB 9, Neistin 7
**Útvísingar:** VB 1, Neistin 4
**Dómarar:** Hanus Kúrberg & Hans Thomassen

Kyndil-StÍF 27-25 (15-14)

# Flott farvæl hjá Kyndli

**Í sínum síðsta heimadysti hetta kappingarárið, megnaðu kvinnurnar hjá Kyndli umsíður tað, sum ikki hevur borið til í teimum 18 undanfarnu dystunum: At vinna**

HONDBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Tað hevur verið ein mótbrekka í allan vetur, men at tað so bragdaði í næstsíðsta dystinum, sum somuleiðis var síðsti heimadysturin í vetur, skal vera teimum grønu væl unt.

Talan var gjøgnumgangandi um ein rímiliga javnan dyst, har Kyndil tó vísti størra yvirskotið og serliga í seinna hálvleiki vísti viljan at vinna so mikið, at tað munaði. Í fyrra hálvleiki var StÍF oftari frammanfyri, men slapp ongantíð avstað, tí Kyndil svaraði alla tíðina væl aftur.

Beinanvegin í seinna hálvleiki sást av álvara møguleikin fyri, at ársins fyrsti sigur kundi vera í nánd, tí eftir at hava verið eitt mál frammanfyri í steðginum, økti Kyndil munin upp í fimm mál fyrstu fimm minuttirnar.

### Tomma avgjørdi

Men hóast kvinnurnar hjá StÍF ikki ordiliga tóktust tendraðar, mannaðu tær seg upp í seinna hálvleiki og komu tær upp á javnleik 23-23, tá bara 10 minuttir vóru eftir at spæla. Men tá var tað, at málverjin hjá Kyndli, Tomma Petersen, skoraði eitt tað mest avgerandi málið í dystinum, so Kyndil kom framum og ongantíð misti leiðsluna aftur.

Kyndil vann bóltin og skuldi í álop, og StÍF-málverjin, Eline Larsen, helt seg síggja møguleikan fyri einari sending frá Tommu langt fram á vøllin, og tí fór hon út á vøllin at verja fyri. Men hetta sá Tomma, og í staðin fyri eina fríspæling, royndi hon seg við einari væleydnaðari skotroynd á málið í hinum endanum – og so var altso 24-23 til Kyndil.

Løtu seinni skoraði toppskjúttin hjá Kyndli, Jacklin Durhuus, til 25-23, og so var meira ella minni leyst og liðugt, og hóast Kyndil eigur aftasta plássið í Sunset-kappingini, er tað ikki longur við einum nulli.

### FAKTA um dystin

**Kyndil-StÍF 27-25 (15-14)**
**10 min:** 6-7
**20 min:** 10-12
**30 min:** 15-14
**40 min:** 21-17
**50 min:** 23-23
**Málskjúttar**
**Kyndil:** Jacklin Durhuus 11 (2), Randi Wardum 4 (2), Ása Christiansen 2, Linda Johansen 2, Helena á Krákusteini 2, Súsanna Petersen 2, Barbara Egilstrøð 1, Birita Mortansdóttir 1, Tomma Petersen 1, Annika Poulsen 1
**StÍF:** Ninna Katrin Johansen 7, Rebekka Justinussen 6 (3), Fríðrún Danielsen 5, Lovisa Andreasen 3, Bára Berthelsen 2, Anna Petersen 2
**Brotskøst:** Kyndil 6, StÍF 5
**Útvísingar:** Kyndil 6, StÍF 3
**Dómarar:** Rúni Mohr & Hannis Wardum

# Sum til jarðarferð

**– Dysturin var fantastiskur, men úrslitið var akkurát tað, sum ikki mátti henda hjá báðum pørtum, sigur ein vónbrotin Annika Ljósstein eftir javnleikin í Vági**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

– Hetta er næstan, sum um onkur er deyður.

Annika Ljósstein hevði ilt við at seta orð á kenslurnar, tá hon og liðfelagarnir úr Neistanum í 10 málleysar minuttir spældu sær av við FM-møguleikan. Ein møguleiki, har tað nú stendur upp til Stjørnuna og Tjaldur at taka av.

Men hóast vónbrotið, so helt Annika kortini, at tær í Neistanum kundu vera ernar av tí, tær hava avrikað seinastu mánaðirnar.

– Eg haldi, at liðið hevur ment seg ótrúliga nógv í vetur. Seinast vit vóru her, vóru vit aftan fyri 22-6 í steðginum, og fyri bara tveimum mánaðum síðani var helst eingin, sum roknaði við, at vit høvdu nakran sum helst møguleika at spæla við um finaluplássið, sigur Annika Ljósstein.

– Í dag fara vit inn til hálvleikin við leiðslu upp á eitt mál, og vit eru partur av einum fantastiska góðum hondbóltsdysti. Her var gott spæl, góðar verjur, góðir áskoðarar. Ja, faktiskt var talan um akkurát ein slíkan dyst, sum ger tað stuttligt at spæla hondbólt, og tí var tað kanska eyka keðiligt, at talan gjørdist um júst tað úrslitið, sum hvørki av liðunum kundi brúka til nakað sum helst.

Seinasta uppgávan hjá Neistanum verður soleiðis móti Tjaldri komandi vikuskifti í tí, sum kundi verið ein finala um finaluplássið, men sum nú er uppgerð uttan nakran týdning yvirhøvur.

– Sjálvandi er tað keðiligt, men vit ætla okkum so at gera okkara til, at talan verður um ein góðan dyst kortini. Ikki minst vilja vit gera tað fyri teir áskoðarar, sum vóru við í Vági og sýndu okkum ótrúliga góðan stuðul í dag. Bert spell, at vit ikki kláraðu at toga sigurin heim, soleiðis at vit framvegis høvdu møguleikan fyri finaluplássinum, sigur Annika Ljósstein.